

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 01 - 2013

# Enn ein risa gassútbygging í Norra

Nú um dagarnar tók Statoil avgerð um at fremja enn eina risastóra útbygging av einum av sínum gassfundum, ta størstu verkætlanina síðani útbyggingina av Snøhvit og Ormen Lange. Talan er um at byggja út Aasta Hansteen kelduna, sum var funnin í 1997, við heimsins størsta framleiðslupalli nakrantíð. Sparpallurin er eitt nýtt slag av palli, sum ongantíð áður er roynt á norska landgrunninum. Hann verður nærum 200 metrar høgur og fer saman við restini av verkætlanini at kosta 60 milliardir krónur. Hann er mettur at gerast tøkniliga mest krevjandi uppgávan nakrantíð í norskari oljuvinnu. Millum størstu verkætlaninar Verkætlanin er tann áttanda størsta í norsku oljusøguni. Bara Troll, Ekofisk og Gullfaks hava kostað meira at byggja. Haraftrat skal ein rørleiðing leggjast á havbotnin á einki minni enn 1300 metra dýpi og verður hon meira enn 500 kilometrar long. Hon verður fyrsta av sínum slag í heiminum og verður nevnd Polarled. Við hesi leiðing verða møguleikarnir í framtíðini nógv størri fyri at flyta gass frá økjunum fyri norðan og frá djúpum vatni til Nyhamna, har tað eisini skulu gerast útbyggingar. Týdning fyri norðurøkini Norski oljumálaráðharrin sigur seg vera sera fegnan um, at Statoil nú fer undir hesa útbyggingina, sum fer at hava stóran týdning fyri økini við Norskahavið. Hetta fer at skapa eitt nýtt grundarlag fyri øðrum útbyggingum í økinum, sum liggur norðan fyri Lofoten og Vesterålen, øki, har tað framvegis er stór ósemja um antin farast skal undir oljuleiting ella ikki. Hetta eru sera góð tíðindi fyri Norðurnorra. Útbyggingin er ein høvuðsorsøkin til, at Statoil letur upp nýggja rakstrareind í Harstad. Samanumtikið verður mett, at henda útbyggingin fer at fáa stóran týdning fyri Norðurnorra í framtíðini. Eisini fer hon at skapa nýggjan infrastruktur í einum øki, har eingin slíkur er frammanundan, og hetta kann koma at gagna øðrum gasskeldum , sum í framtíðini verða funnin í økinum og eisini heilt norðurií

Barentshavinum. Tær størstu oljuverkætlaninar (fram til 2011) - . Troll -122 milliarder kroner . Ekofisk - 84 milliarder kroner . Gullfaks - 72 milliarder kroner . Oseberg - 64 milliarder kroner . Statfjord - 63 milliarder kroner . Snorre - 62 milliarder kroner . Åsgard - 60 milliarder kroner . Aasta Hansteen/Polarled 57 milliarder kroner . Valhall -56 milliarder kroner . Heidrun - 50 milliarder kroner Myndir - Nýggi og fyrsti pallurin av sínum slag er 200 metrar høgur og her síggja vit støddina sammett við býarumhvørvi í Norra.